
***Hugskot og viðmerkingar** – send sms til 225000*

Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

TÁ BISPUR SLÓ HØVDIÐ Í...

Tað var in.fo, sum fyri einum mánaði síðani reisti spurningin, um tað var rætt framfarið, tá Eiðis kommuna bjóðaði til kirkjukonsert á Eiði, har fólk skuldu rinda 100 krónur fyri at koma í kirkju.

Hetta skurraði í oyrunum á mongum, og tí reistu vit í Miðlahúsinum spurningin – og fyri at fáa hann eftirkannaðan spurdu vit bisp, um tey á Eiði ikki vóru farin ov vítt.

Men tað helt bispur ikki. Als ikki. Hann metti hendan nýggja mátan at vinna pening frá fólki at koma í kirkju sum eina góða og erliga roynd – sum var meira gjøgnumskygd, tí nú vóru tað tey, sum fóru til konsert, sum rindaðu – meðan tey, sum ikki fóru, spardu tann hundraðkrónuseðlin – og soleiðis varð kirkjuskatturin ikki nýttur til virksemi, ið sum so ikki hevði nakað við kirkjuna at gera.

Endamálið hjá Miðlahúsinum at spyrja bisp var at fáa svarið, um hetta var innan fyri lógarinnar karm.

Svarið fingu vit, men svarið var ikki rætt. Bispur mistók seg. Tað hevur hann síðani viðgingið.

Við Kringvarpið svaraði hann so myndaliga, at hann hevði sligið høvdið í kirkjudurakarmin.

Tá Rás2 spurdi bisp tann 13. juni vísti hann á, at hetta var nakað nýtt, at fólk hava ymiskar hugsanir um hetta at taka pengar. Spurdur um tað var í lagi, at yvirskotið av eini kirkjukonsert fór til Eiðis kommunu – at styrkja um trivnaðar- og ferðavinnuarbeiði, segði bispur, at tað valla fór at vera nakað yvirskot til Eiðis kommunu.

At taka pengar við kirkjudyrnar – og soleiðis at nýta kirkjurnar til handilslig endamál er rættiliga prinsippielt. Tað fær okkum at hugsa um, tá Jesus á sinni rak handilsmenninar úr tempulgarðinum. Tað kann so ongantíð vera eitt endamál at vinna pengar upp á krikjuna til at nýta til eina kommunu og til ferðavinnu. Júst hetta



dømið vísir helst, hvussu endamálið kann skeivklast.

Eftir øllum at døma hevur bispur ikki vitað, hvat kirkjan kann nýtast til. Tí hann segði, at kirkjan hevur umhugsað spurningin í fleiri ár um at júst at taka gjald fyri kikrjukonsertir. Hvussu kann kirkjan í fleiri ár umhugsa ein slíkan spurning, tá als eingin lógarheimild er?

Um upprunaligu søgun um handilsligu konsertina í Eiðis kirkju segði bispur, at »onkur hevði fingið skeiva beinið út av seingini«. Nú sigur hann, at hann og tey í kirkjuni hava sligið høvdið í.

Ikki altíð gongst sum prestur prædikar...

Nógvur makrelur til Gøtu

Fyrr í vikuni fingu Tróndur í Gøtu, Finnur Fríði og Jupiter makrel- og sildaloyvi. Enn er tað kortini bara Finnur Fríði, sum hevur loyst, tí hann er farin at gera royndir eftir makreli og sild saman við Havstovuni.



Tey trý skipini hava rættiliga stóra makrelkvotu. Finnur Fríði kann fiska 16.711 tons, Tróndur í Gøtu 12.108 tons og Jupiter 10.898 tons. Sostatt er makrelkvotan hjá teimum trimum skipunum knappliga 40.000 tons.

Skipini hava eisini fingið loyvi at fiska sild, men her eru kvoturnar rættiliga misjavnar. Størstu sildakvotuna hevur Finnur Fríði, sum kann fiska 4.552 tons. Kvotan hjá Jupiter er 2.271 tons, meðan Tróndur í Gøtu hevur bara loyvi at fiska 373 tons av sild.

Leingjast eftir grindadrápi

Fólkini, sum Paul Watson hevur sent til Føroya at verja grindahvalin, tykjast keða seg illa í Føroyum.

Tey royna javnan at skriva út á facebookbólkin, GrindStop2014, men har er ikki nógv at síggja til grindahval. Men tó, nú ein dagin bjargaðu tey eini likku, sum helst var yvirkoyrd av einum bili.

Men stóri leiðarin hjá hesum fólkunum, sum eru komin til Føroya, her tey halda, at vit dagliga drepa grind – Paul Watson, roynir at halda grýtuni á kóki.

Í hirðabrævi sínum um dagarnar langar hann til og samanber føroyingar neyðtøkufólk hópsdrápsmenn og pedofilar.

Eingin grind hevur víst seg, og tað er ikki gott fyri Sea



Shepherd, hvørs tilverugrundarlag er treytað av blóðugum myndum, sum tey altso ikki fáa í Føroyum. Men við at øsa okkum og fáa okkum til at gera okkurt verri enn at skøva gomlu bilarnar, so kanska fær hann onkrar myndir ella okkurt at skriva um.

Tað er altíð gott, at fólk royna at verja lív. Men kanska tað er at taka tingini úr samanhanginum, tá fólk, sum koma frá londum sum framvegis drepa menniskju, koma higar og rópa okkum drápsmenn, neyðtøkubrotsmenn og pedofilar, tí vit drepa grind.

Størsta problemið hjá teimum er tó, at her er eingin grind dripin enn!



Kommunur gyltan møguleika

EYÐGUNN SAMUELSEN
KJAK SÍÐA 13



Útróður í Vestmanna

SÍMUN PAULI JACOBSEN
KJAK SÍÐA 13

Nýtt heimavirkisfelag fekk 45 limir



Norðstreymoyar heimavirkisfelag varð sett á stovn í mikukvøldið

Fundurin var í hugnaligu Vektarbúðini í Vestmanna. Fitt av fólki møttu, og 45 limir vórðu teknaðir.

Nevnd varð vald og skipaði seg við Barbaru Brattaberg sum forkvinnu, Maud Poulsen sum skrivara og Maluni Stórá sum kassameistara.

– Við stovnanini av Norðstreymoyar Heimavirkisfelag verður høvi at selja heimavirkaða vøru í Vestmanna alt árið. Eisini verður høvi at keypa sær kaffi og køku í kafé'ini.

Felagið sigur, at opið verður í Norðstreymoyar Heimavirkisfelag mánadag til leygardag, frá klokkan 13-17 - fyribils fram til 16. august.

– Eftir hetta verða upplatingartíðirnar møguliga broyttar, sigur nýstovnaða felagið í tíðindaskrivi.

Sáttmáli er gjørdur um at leiga íbúðina og handilin hjá Niels hjá John. Ætlanin er eisini at hava kafé í íbúðini og at selja heimavirkaðar vørur í gamla handlinum.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí kl. 08.00 - 16.00

Tíðindaleiðari
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

Tórshavn Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

Norðoyggjar Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

Suðuroy tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*